## Jólakapping í Boccia

Leygardagin klokkan 14 skipar ÍSB fyri stórari jólakapping í Boccia. Kappast verður í KÍ-høllini í Klaksvík. Talan er um kapping, har bæði rørslu- og menningartarnað sleppa at royna seg. Kappast verður í trimum bólkum, har tey rørslutarnaðu eru í einum av hesum. Menningartarnað kappast í einum FM-bólki og í einum opnum bólki.



## Seedingin avdúkað í dag

Fríggjadagin fer FIFA at kasta lut um, hvussu bólkarnir í HM-endaspælinum í 2010 síggja út. Undan hesum skal tó finnast út av, hvussu liðini skulu styrkimetast, og hetta hevur elvt til trætur. Eitt nú hevur verið gitt, at FIFA hesa ferð ferð at nýta eina blanding av styrkislistanum og HM-avrikunum seinastu tvey endaspølini, tá styrkismetingin verður gjørd. Tað ber millum annað við sær, at Holland kemur í sterkasta bólkin, meðan Ongland dettur ein bólk niður. Verður vanliga styrkismetingin brúkt, verða tey átta ovastu hesi: Suðurafrika, Brasil, Spania, Italia, Týskland, Argentina, Ongland og Frakland.

# Fleiri met í Klaksvík

**Ítróttasambandið fyri brekað skipaði fyri svimjikapping um vikuskiftið**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Yvir 20 svimjarar vóru við til kappingina, sum varð hildin í Klaksvík sunnudagin 29. november. Jógvan Skorheim, vararborgarstjóri í Klaksvík, setti kappingina.

Svimjarnir umboðaðu ítróttafelagið Svan í Eystuoynni og svimjifelagið Ægir í Klaksvík. Eisini vóru svimjarar úr Havn. Tað sást týðuliga at ítróttafólkini høvdu vant nógv, tí nærum øll settu persónlig met í kappingini.

10 ára gamla Krista Mørkøre, sum hevur umboðað Føroyar í altjóða kappingum, setti fleiri persónlig met. Millum annað setti hon persónligt met í 50 m frí við tíðini 39,39. Krista luttók eisini í 50 m rygg, bringu og firvald.

Aplonina Justesen úr svimjifelagnum Ægir vann gull í greinini 50 m frí við tíðini 35,53. Krista Mørkøre kom á 2. pláss við tíðini 39,39 og á 3. pláss kom Halla Poulsen úr ítróttafelagnum Svani við tíðini 47,51



Krista Mørkøre var ein av svimjarunum, sum setti fleiri persónlig met, tá jólakapping í svimjing varð hildin seinasta vikuskifti

Robert Poulsen úr Havn var skjótasti drongurin á 50 m teininum í frísvimjing. Hann kom inn við tíðini 38,18, sum eisini er eitt persónligt met. Júst í Túni kom á annað pláss við tíðini 38,42 og á triðja pláss kom Eivind Toftegaard við tíðini 39,16.

ÍSB fegnast um tey góðu avrikini og um at alt fleiri ung, ið bera brek, vilja íðka ítrótt.

# FIFA sigur nei við Írland

**Tað verður ikki talan um eitt HM-endaspæl við 33 londum á hesum sinni**




Heri Simonsen

Fyrispurningurin hjá Írlandi, um at gerast land nummar 33 í HM-endaspælinum byggir á rokmiklu hendingina, tá fraklendingurin, Thierry Henry førkaði bóltin við hondini í tí seinna play-off dystinum millum Írland og Frakland á Stadé de France í París.

Írar høvdu ikki so ræðuliga stórar vónir um, at FIFA fór at ganga teirra ynski á møti, men teir valdu kortini at senda fyrispurningin, bara fyri at fáa ein respons frá FIFA.

Responsin hava írar fingið. Aðalskrivarin hjá FIFA, Jerome Valcke sigur við Sky Sports, at tað er ógjørligt at broyta bygnaðin í HM-endaspælinum so stutt undan HM. Jerome Valcke heldur eisini, at FIFA hevði druknað í fyrispurningum og krøvum frá ymiskum FIFA-limalondum, um teir høvdu gingið við til kravið hjá Írlandi.

Jerome Valcke metir tó ikki fyrispurningin hjá Írlandi vera tápuligan.

- Tað er bara ikki gjørligt at gjøgnumføra eina slíka broyting, staðfestir FIFA-aðalskrivarin.

Fríggjadagin verður lutakast um bólkabýtið í Suður-Afrika. Tey 32 luttakandi londini skulu býtast í átta bólkar. Tá byrjar HM-niðurteljingin av sonnum.

# Vilja kroysta pening úr Berbatov

**Eitt brotsmannalið hóttir Berbatov við, at um ikki hann rindar teimum pening, so ræna teir konuna og dóttrina**




Heri Simonsen

Sambært enska blaðnum, Daily Mirror hevur sjálvur høvuðsvenjarin hjá Manchester United, Alex Ferguson tikið stig til at fáa Berbatov og familjuna trygt heim úr úr Bulgaria til Onglands við einum privatflogfari. Bulgarska brotsmannaliðið krevur eina upphædd, sum svarar til umleið fimm miljónir krónur í okkara peningi.

Ein bulgarsk kelda sigur við Daily Mirror:

- Dimitar (Berbatov, red.) er ógvuliga óttafullur um familjuna hjá sær, og hevur lovað sínum grannum pening, um teir síggja nakað illgrunasamt rundan um húsini hjá honum í Sofia.

Manchester United-framherjin var heima í Sofia í Bulgaria saman við konuni, Elenu og dóttrini, Dea í næstsíðstu viku. Tá setti ránsmannaliðið seg í samband við mammuna hjá Berbatov, Margarita.

Sambært Daily Mirror vildi Berbatov ikki seta seg í samband við bulgarsku løgregluna, tá hann fekk at vita, at ránsmannaliðið samstarvaði við fólk, sum arbeiða í bulgarska innanríkismálaráðnum. Sambært enska blaðnum hevur Berbatov eisini samrátt seg til eina avtalu við brotsmannaliðið, sum skal hava gingið við til at lova at geva familjuni frið.

Men aftaná seinastu hóttanina hevur Berbatov økt um trygdina rundan um húsini í Manchester. Men Berbatov vil ikki úttala seg um málið, tí talan er um ein trygdarspurning, skrivar Daily Mirror.

Seinastu 20 árini, síðani jarntjaldið í Eystur-Europa fall, er talið av brotsmannaliðum nógv økt í Europa, og í mongum eystureuropeiskum londum standa fólk púra hjálparleys, tá brotsmannaliðini gera um seg.




**Dimitar Berbatov verður í hesum døgum hóttur av brotsmannaliði, sum vil kroysta pening burtur úr hóttanum móti familjuni hjá spælaranum**
Mynd: Polfoto/AP